

*Framsýningin Gluggaglæma er opin til sunnudagin, og longu nú hava nógv fólk vitjað*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kreativ vinna hevur framgongd

**– Ein týdningarmikil partur av vinnupolitikkinum er at styrkja og menna nýskapandi føroyskar fyritøkur. Tí verður dentur lagdur á at eggja til fjølbroytni bæði í kendari og eisini framkomnari framleiðslu, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tá ið framsýningin Glugga glæma varð sett**

FRAMSÝNING
*Eyðun Klakstein*

Í hesum døgum er forvitnislig framsýning í Müllers Pakkhúsi í Havn.

Framsýningin, sum kallast Gluggaglæma, er ein sjálvstøðu verkætlan hjá Føroya Heimavirkisfelag, og Vinnuframagrunnurin, Tórshavnar Kommuna og einstaklingar stuðla.

Endamálið við Gluggaglæmu er at skapa eitt nýtt og øðrvísi søluumhvørvi fyri tey, ið ynskja at koma longri á leið við handverkinum enn bert til dagdvølju ella ítriv.

Framsýningin verður skipað sum eitt livandi verkstaðarumhvørvi, har dygdargóðar vørur verða framleiddar, og har vitjandi fáa høvi til at síggja, hvussu vørurnar verða framleiddar. Hin einstaki framleiðarin fær somuleiðis eitt beinleiðis samskifti við keyparan, nakað sum kann geva honum royndir og íblástur til framhaldandi menning..

Umframt høvuðstáttin, livandi verkstaðir, verða fyrilestrar um evni, ið snúgva seg um føroyskt handverk. Annað til gamans verður kafé við heimabakstri, tónleikur, sangur, og mótasýning.

Bjarni Djurholm, sum er landsstýrismaður við vinnumálum, helt røðu, tá ið framsýningin varð sett sunnudagin.

Hann helt, at framsýningin er prógv um ta positivu gongd í kreativu vinnunum, sum hevur verið í Føroyum seinastu árini. Kreativar vinnur hava fingið serstakt pláss í orðaða vinnupolitikkinum.

– Ein týdningarmikil partur av vinnupolitikkinum er at styrkja og menna nýskapandi føroyskar fyritøkur. Tí verður dentur lagdur á at eggja til fjølbroytni bæði í kendari og eisini framkomnari framleiðslu, segði Bjarni Djurholm.

– Tá hendur og listarligur hugur ganga saman í hægri eind, og ágrýtnið ongantíð at lata annað úr hondum enn tað besta og nærum fullkomna er leitorðið, ja, so falla allar forðingar burtur.

Bjarni Djurholm kom inn á møguleikarnar, sum føroysk vinna hevur í útlondum við nýggjum og nýskapandi vørum.

– Enn er sjálvsagt langt á mál. Tí eiga vit áhaldandi at bróta úr nýggjum og soleiðis menna okkum longur fram á leiðini. Henda framsýningin er talandi prógv um, at vit eru ávegis – ja, enntá komin væl áleiðis.

– Eg vóni, at fleiri fara at trúgva so nógv upp á síni egnu hugskot, at tey tora at standa á egnum beinum, segði Bjarni Djurholm.



*– Eg vóni, at fleiri fara at trúgva so nógv upp á síni egnu hugskot, at tey tora at standa á egnum beinum, segði Bjarni Djurholm*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Framsýningin verður skipað sum eitt livandi verkstaðarumhvørvi, har dygdargóðar vørur verða framleiddar, og har vitjandi fáa høvi til at síggja, hvussu vørurnar verða framleiddar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Jógvan við Keldu setir føtur í spenni

**Hann krevur at játtanin til Klaksvíkar Sjúkrahús á fíggjarlógini fyri komandi ár skal hækka líka nógv, sum játtanin til Landssjúkrahúsið hækkar**

FÍGGJARLÓGIN 2004
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Játtanin til Klaksvíkar Sjúkrahús skal hækka líka nógv prosent, sum játtanin til Landsjúkrahúsið hækkar.

Tað er kravið hjá Jógvani við Keldu, løgtingsmanni.

Hann er sjálvur limur í samgonguni, men nú fíggjarlógin fyri næsta ár er til viðgerðar, hevur hann gjørt púra greitt, at hann kann undir ongum umstøðum góðtaka, at játtanin til Klaksvíkar Sjúkrahús hækkar minni í prosentum enn ætlanin er, at játtanin til Landssjúkrahúsið skal hækka.

Hann sigur, at hann hevur fingið upplýst úr samgonguni, at ætlanin er, at játtanin til Landssjúkrahúsið skal hækka eina ávísa upphædd. Hinvegin er ætlanin at játtanin til Klaksvíkar Sjúkrahús skal standa í stað og at játtanin til Suðuroyar Sjúkrahús skal lækka.

– At játtanin verður nullstillað, er tað sama um ein lækking, tí bæði lønir og prísir annars, fara upp hvørt ár.

Men hetta góðtekur samgongutingmaðurin úr Klaksvík ikki og tað ætlar hann at gera vart við beinanvegin.

Sostatt stillar Jógvan við Keldu seg í raðið av tingmonnum úr samgonguni, sum ikki taka undir við fíggjarlógini.

Men enn hevur hann kortini ikki hug at tosa við stórum stavum.

– Eg ætli at gera vart við mína støðu beinanvegin, og lat okkum fyrst síggja, hvussu leikur ferð, áðrenn eg sigi nakað um, hvat eg fari at gera, sigur hann.

– Tað kemur tíðin at vísa, hvat eg geri, sigur hann.

## Avmontera smáu sjúkrahúsini

Hann sigur, at hvørt einasta ár er støðan tann, at Landssjúkrahúsið við jøvnum millumbilum fær eykajáttanir ímeðan lyndi altíð eru til at halda aftur við játtanum til tey smærru sjúkrahúsunum.

– Vit hava eina lóg sum sigur, at tað skulu vera trý sjúkrahús í Føroyum. Men soleiðis, sum fíggjarlóginar hesi seinastu nógvu árini hava verið, verða tey smáu sjúkrahúsini avrættað spakiliga, men trygt.

– Hvørt einasta ár er støðan tann, at játtanirnar til tey smáu sjúkrahúsini hækkar lutfalsliga minni enn játtanin til Landssjúkrahúsið, og tað tykist aftur at verða ætlanin komandi ár.

*Ætlanin hjá politikarum er at avmontera tey smáu sjúkrahúsini so líðandi, men einum slíkum ssamgongupolitikki kann eg undir ongum umstøðum stuðla, sigur Jógvan við Keldu, løgtingsmaður úr Klaksvík og limur í samgonguni*

Jógvan við Keldu er vísur í, at tað er tann miðvísa ætlanin hjá samgonguni at taka tey smáu sjúkrahúsini av so líðandi. Men einum slíkum samgongupolitikki kann hann undir ongum umstøðum stuðla, sigur hann.

Hann vísir á, at Suðuroyar Sjúkrahús er bygt út fyri einar 80 milliónir seinastu árini.

– Sostatt eru karmarnir góðir og teir skulu fyllast út við læknum og helst eini sergrein afturat, fyri at lokka ein yvirlækna at søkja arbeiði har.

Jógvan við Keldu ivast í, hvussu rætt tað er, tá ið sagt verður, at tað er so trupult at fáa læknar á tey smáu sjúkrahúsini.

– Spurningurin er, hvussu nógva orku tey leggja í at fáa læknar á tey smáu sjúkrahúsini. Ongin tímur at søkja eitt starv, har tað hálvavegna liggur í luftini, at tað verður niðurlagt um stutta tíð.

Jógvan við Keldu heldur avgjørt, at ein sergrein eigur at verða skipað á Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri at fáa serlæknar at støðast.

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er støðan tann, at 2,6 milliónir vórðu skarvaðar av játtanini í fjør.

– Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er ortopedi og har vita við, nágreiniliga, hvat hvør skurðviðgerð kostar. Játta vit eitt ávíst krónutal minni, vita vit nágreiniliga, hvussu nógvar skurðviðgerðir vit kunnu gera færri á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

## Má takast upp í samgonguni

Jógvan við Keldur heldur avgjørt, at samgongan eigur at taka spurningin um tey trý sjúkrahúsini upp.

Hann vísir eisini til tey ótryggu viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum, har ósemja um leiðsluna javnan stinga seg undan kavi.

– Tað er lítil nytta at blíva við at hækka játtanina til Landsjúkrahúsið, uttan at vit fáa vissu fyri, at tað fer at virka betri so at vit fáa nakað fyri pengarnar. Hetta er at kasta góðan pening eftur vánaligum peningi, sigur Jógvan við Keldu.



# Í dag fer Annita at seta spakan í

**Ein hin fyrsta almenna uppgávan hjá nýggju landsstýriskvinnuni í mentamálum, Annitu á Fríðriksmørk, verður at seta spakan í fyri nýggja miðnámsskúlanum í Suðuroy**

NÝGGJUR MIÐNÁMSSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dag fer Annita á Fríðriksmørk, spildurnýggj landsstýriskvinna í mentamálum, at seta fyrsta spakan í fyri nýggja miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Sostatt verður hetta ein hin fyrsta almenna uppgávan hjá nýggju landsstýriskvinnuni.

Í hesum sambandi verður hátíðarhald vesturi á Eiðinum á stykkinum í Vági har skúlin skal byggjast, klokkan 15 í dag, har verður horntónlekur, røður og kirkjukórið Ljómur fer at syngja.



## Mentanarmiðdepil

Nýggi Miðnámsskúlin í Suðuroy verður sambygdur við meginbókasavnið í Suðuroy, og tilsamans verður húsið umleið 2800 fermetrar til støddar. Tað er Arkitektavirkið hjá Árna Winther, sum hevur teknað húsið.

– Talan er ikki bert um ein vanligan skúla. Talan er um eitt hús, ið umframt skúla, eisini fer at húsa bæði meginbókasavni og samkomuhøll, sigur Mentamálaráðið í tíðindaskrivi.

Sostatt fer at bera væl til at hava annað virksemi í húsinum enn bara undirvísing. Í meginbókasavninum ber sjálvandi til at læna bøkur, men tað fer eisini at bera til at leita eftir upplýsingum á internetinum, og verður tað neyðugt, fer eisini at bera til at fáa serkøna hjálp til tað. Samkomuhøllin kann nýtast til nógv ymisk endamál, tí hon kann broytast frá at hava slætt gólv til at hava hækkað áskoðaragólv.

Í samkomuhøllini verða sostatt fjøllbroytir møguleikar fyri at vísa sjónleik og film, ella fyri konsertum og fyrilestrum og sostatt kann talan gerast um eitt rættiligt Suðuroyarhús.

Við hesum hevur mentamálaráðið sekk skjøtul á miðnámsskúlan. Hetta er ein skúli, sum verður bygdur við atliti at framtíðina. Hetta merkir m.a. at í ávísan mun fer taða t bera til at broyta innrættingina, skuldi aðrir undirvísingarhættir tikið seg upp í framtíðini, sum vit onki kenna til í dag. Mentamálaráðið sigur, at tey vóna, at allir suðuringar fara at taka væl ímóti nýggja Miðnámsskúlanum og at tey fara at brúka alt húsið.

– Bert við at verður brúktur, kann bygningurin gerast ein livandi og virkin partur av útbúgvingar- og mentanarlívinum í Suðuroy, sigur mentamálaráðið.